# í Glyvra kirkju



hjá Heðini Kambsdal, og Heðin Kamsdal fer sjálvur at hugleiða eitt sindur um Mendelssohn og tónleik hansara.

Kvøldið byrjar tó við, at Meinhard Bjartalíð, sókarprestur bjóðar vælkomin, og hann fer at siga nøkur orð um list og trúnna. At list ikki bara er tað, sum vit síggja, men at listin, málningalistin sum væl sum tónleikurin, gera nakað við okkum menniskju.

### List og kvirra

Í næstu viku er mentanarvika í Runavíkar kommunu, og mánakvøldið, mikukvøldið og fríggjakvøldið verður kirkjan opin frá klokkan 20 til 22.

Fólk hava tá møguleikan at fara inn í kirkjuna at síggja málningaframsýningina í forkirkjuni, og tey kunnu fara inn í sjálva kirkjuna at nýta kvirruna. List og kvirra nevnir Meinhard Bjartalíð hesi kvøldið.

Vitjandi í krikjuni fáa hesi kvøldini eisini høvi at tendra ljós í ljoskolbuni, sum kirkjan hevur fingið.

- Hví tendra ljós? Vit kunnu tendra ljós fyri onkrum, sum liggur okkum á hjarta. Tað kann vra ein bøn ella ein tøkk, sum ein heldur fyri seg sjálvan, sigur Meinhard Bjartalíð.

Hesi trý kvøldini verður aftanbøn klokkan 21.45, og enda verður við kvøldsálmi.

Mentanarvikan endar sunnukvøldið við sangkvøldi í kirkjuni, har nýggir sálmar verða sungnir, og kór Glyvra kirkju luttekur eisini.

# verkstaðnum



# Ársins trøllashow

**Trøllapætur og hansara næstu umframt Steintór Rasmussen enda menatarvikuna í Runavík sunnudagin í næstu viku**

MENTAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Undanfarnu árini er vorðin siður at enda mentanarvikuna við einum stórum tiltaki, ið serliga er ætlað børnum. Í ár er einki undantak, tí Mentanarvikan 2009 í Runavík endar við einum stórum barnatiltaki.

Vit kenna øll fitta, fleirhøvdaða Trøllapætur, Trøllababy, sum bara sigur dadada og gagaga, villu Trøllaommuna, og ikki minst lítlu, garrvillu Trøllaommudidduna. Trøll kunnu tykjast ræðandi, men hesi trøllini eru góð við børn, sera fitt og ikki minst stuttlig. Hóast tað onkuntíð endar í einum lítlum hurlivasa, dámar teimum allarbest, tá ið tey sleppa at syngja og dansa saman við børnunum.

Afturat øllum trøllunum kemur Steintór Rasmussen eisini at syngja saman við børnunum, og eins og undanfarin ár, verður Bassi sjálvandi aftur á staðnum, og hann plagar altíð at hava okkurt gott við til børnini.

Tiltakið verður í ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin 15. oktober klokkan 17. Tað varar hálvan annan tíma.



# Edith Mørkøre sýnir fram við Løkin

**Listaframsýningin í skúlanum við Løkin í Runavík letur upp sunnudagin**

Mentanarvikan í Runavík byrjar sunnudagin, og henda dagin klokkan 16 letur Edith Mørkøre málningaframsýning upp í skúlanum við Løkin.

Við á framsýningini hevur hon sínar nýggjastu málningar. Hon málar út frá menniskjaligum virðum, og á framsýningin hevur hon abstrakta/ekspresionistiska list. Íblásturin fær hon úr tí dagliga lívinum og hendingum, sum hon og onnur koma út fyri.

Edith Mørkøre er 30 ára gomul, ættað av Argjum og býr í Hoyvík. Hon arbeiðir við listini sum høvuðsstarv. Hon hevur gingið á háskúla í Danmark og tók sergrein í list.

Hon hevur luttikið á fleiri framsýningum bæði í Føroyum og í Danmark.

Framsýningin verður opin sunnudagin, mánadagin og týsdagin frá kl. 16 til 20, mikudagin frá kl. 17 til 19, hósdagin frá kl. 16 til 19, og fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin frá kl. 16 til 20.

